# Strikurnar

Høvundur: Dánial Hoydal (FO)
Myndprýðari: Annika Øyrabø (FO)
Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2022

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2023

Søgugongd: Strikur eru allastaðni. Á gongubreytini, í hurðagloppinum, undir loftinum, yvir songini. Hví eru strikur allastaðni? Tað er trupult at greiða frá strikunum, tá sjálvt ikki tín besti vinur skilur tær.

Evni: angist, sorg, vinalag, kenslur, familja




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**1. Hyggið at permuni. Hvat síggja tit?**

**2. Sært tú nógvar strikur? Hvørji onnur skap finna tit í bókini?**

**3. Hvussu sært tú út, tá tú ert glað/ur? Hvussu sært tú út, tá tú ert kedd/ur? Vís við andlitinum.**

### TEY YNGRU

**1. Hvat hugsar tú um, tá tú sært permuna?**

**2. Hvørjar strikur og skap finnur tú í bókini?**

**3. Eru myndir í bókini, sum vísa sterkar kenslur?**

**4. Ger eina andlitsmynd úr pappírsklippi, sum sýnir eina kenslu.**

### MIÐLINGAR

**1. Finnið myndir av høvuðspersóninum og vinmanninum, Høgna. Hvat hendir á myndunum?**

**2. Hvussu kemur sorg til sjóndar í bókini?**

**3. Hyggið at myndunum í for- og baksatsinum. Hvat hendir við strikunum?**

**4. Ger eitt pappírsklipp, sum vísir eitt minni, ið hevur serligan týdning fyri teg, ella okkurt, sum tær dámar at gera saman við tínum vinum.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat dámdi tær við bókini? Hvat dámdi tær ikki? Var nakað, sum var trupult? Finnur tú mynstur og samband við aðrar søgur?**

**2. Hvat hugsar tú um um, tá tú hyggur at permuni? Hvat heldur tú, at bókin fer at snúgva seg um?**

**3. Hví vil høvuðspersónurin ikki fortelja um strikurnar? Kemur tú at hugsa um nakað, sum er torført at tosa um?**

**4. Ímynda tær, at høvuðspersónurin fortelur Høgna um strikurnar. Hvussu hevði Høgni svarað? Og hvussu hevði tú svarað?**

**5. Ger eina mynd við pappírsklippi um okkurt, sum er ræðandi.**

**LES EISINI:**

**"Jag och alla" eftir Ylva Karlsson og Sara Lundberg**

**"Mánugánda ja Heike" eftir Signe Iversen, Sissel Horndal**

**"Berre mor og Ellinor" eftir Ingrid Z. Aanestad**

**Abbi og eg og abbi eftir Dánial Hoydal og Annika Øyrabø**

MÁLBITIN

## " Strika"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursámiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Streck** | **Streg** | **Strek** | **Strik** | **Strika** | **Titarneq** | **Viiva** | **Sáhcu** |



**Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!**